## Útisigur til Christian Høgna

Christian Høgni Jacobsen og liðfelagarnir í AB spældu í gjár útidyst á Lollandi ímóti Lolland Falster Alliancen. Og tað hilnaðist væl hjá AB, sum vann 1-0. Støðan í hálvleikinum var javnleikur 0-0. Simon Bræmer gjørdist stóra hetjan hjá AB, tá hann eftir 66 minuttum skoraði sigursmálið hjá AB. AB er nú nummar fýra í næstbestu donsku fótbóltsdeildini við 37 stigum. Fimm stig eru upp til Viborg, sum liggur á øðrum plássi, sum gevur uppflyting til bestu fótbóltsdeildina. Komandi leygardag hevur AB heimadyst ímóti Kolding.



## Rumenski venjarin missir starvið

Eysturríki hevur skift venjara, og nú stendur enn ein venjari hjá landi, sum er í HM-bólki saman við Føroyum, til at missa starvið. Rumenska fótbóltssambandið hevur mist álitið á venjaran Victor Piturca, og nú skulu partarnir gera semju um, hvussu samstarvið teirra millum skal enda.
- Eg havi biðið nevndina taka upp samráðingar við venjaran, so at partarnir kunnu gera eina semju um, at samstarvið endar nú, sigur Mircea Sandu, forseti í rumenska fótbóltssambandinum, við Reuters.

# Martin helt høvdið kalt

**Fyri fjórðu ferð er Martin Poulsen føroyameistari í talvi. Men fram til tað seinasta helt spenningurin sær, tá ein umdystur millum Martin, Helga Dam Ziska og Ólav Simonsen lúrdi**

TALV

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Martin Pouseln er í ferð við at skriva seg í søgubøkurnar sum ein tann mest vinnandi FM-telvarin. Fyrsta FM-heitið varð vunnið í 2003 og tað næsta í 2004. Triðja FM heitið kom til høldar í 2006. Í 2005 og 2007 tapti Martin umdystir um FM-heitið ímóti ávikavíst Carl Eli Nolsøe Samuelsen og John Rødgaard.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Um páskirnar varð FM í talvi fyri einstaklingar á skránni, og fyri fjórðu ferð eydnaðist tað Martini Poulsen at ogna sær FM-heitið.

Tað var annars ikki so nógv, sum bendi tann vegin eftir fyrsta umfarið. Tá dystaðist Martin nevnliga móti Helga Dam Ziska, og sigurin hjá Helga í hesum talvinum gav ábendingar um, at favoritturin skuldi strúka avstað við FM-heitinum.

Helgi helt eisini fast um oddasessin til og við sætta umfar. Í sjeynda umfarinum snávaði Helgi móti Finnbjørn Vang, sum eftir fleiri enn hundrað leikir ognaði sær javnleik, og í áttanda umfarinum vann Ólavur Simonsen ein tryggan sigur móti Helga.

Samstundis hevði Martin Poulsen sítt at stríðast við. Stigamissirnir hjá Helga góvu Martini møguleikan at leggja seg á odda, men móti Herlufi Hansen tóktist Martin liggja undir, tá Herluf tíðliga í talvinum vann sær fyrimun. Tað eydnaðist tó Martini at stríða seg til javnleikin, og so kundi hann við sigri á Rógva E. Nielsen í seinasta umfarinum ogna sær steypið.

Men heldur ikki hetta gjørdist lætt, og veruleikin var helst, at Rógvi skuldi vunnið sær í minsta lagi javnleik. Men í tíðartrýstinum móti endanum vórðu nøkur mistøk framd, og eftir fimm tímar við borðið kundi Martin fyri fjórðu ferð rópa seg føroyameistara.

Hevði Martin ístaðin telvað javnt, høvdu bæði Ólavur og Helgi greitt sín setning, og tí hevði verið neyðugt við umdyst millum teir tríggjar. Ein møguleiki, sum tó ikki gjørdist aktuellur kortini.

### FAKTA

**Landsliðsbólkurin**

| Nr. | Telvari | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Martin Poulsen | 7,0 |
| 2 | Ólavur Simonsen | 6,5 |
| 3 | IM Helgi Dam Ziska | 6,5 |
| 4 | Hans Kristian Simonsen | 6,0 |
| 5 | Finnbjørn Vang | 4,0 |
| 6 | Olaf Berg | 4,0 |
| 7 | Sjúrður Thorsteinsson | 3,5 |
| 8 | Herluf Hansen | 3,5 |
| 9 | Torkil Nielsen | 2,5 |
| 10 | Rógvi E. Nielsen | 1,5 |

## TB sendi B36 út

Skírisdag vórðu 1/8--finalurnar í kappingini um Løgmanssteypið spældar.

Og tað var ikki frítt, at nøkur óvæntað úrslit vóru at síggja. Ikki minst á Tvøroyri, har TB stríddi seg málleysan javnleik móti B36, fyri síðani at senda stórfavorittarnar út í brotssparkskappingini. Og tey bæði nýggju liðini í Vodafone-deildini, AB og 07 Vestur, fingu bæði skalpar hjá øðrum Vodafone-liðum.

Niðanfyri prenta við úrslit og málskjúttar í ymsu dystunum.

**Víkingur-MB 5-0 (3-0)**
1-0:Hans Jørgen Djurhuus
2-0:Sam Jacobsen
3-0:Andreas Lava Olsen
4-0:Martin Olsen
5-0:Sølvi Vatnhamar

**AB-B68 3-2 (1-1)**
0-1:André Olsen
1-1:Dion Splidt
1-2:André Olsen
2-2:Janus M. Joensen
3-2:Dánial Rói Olsen

**FC Hoyvík-Undri FF 4-0 (1-0)**
1-0:Finn Mørk
2-0:Ikechukwu Onyema
3-0:Ronnie Hansen
4-0:Allan Poulsen

**TB-B36 0-0 (umdystur 0-0)**
TB vann 8-7 eftir brotssparkskapping

**KÍ-07 Vestur 0-3 (0-0)**
0-1:Holgar Djurhuus
0-2:Milan Pejcic
0-3:Kim Poulsen

**B71-ÍF 0-1 (0-0)**
0-1:John Thomsen

**HB-NSÍ 2-1 (1-1)**
1-0:Fróði Benjaminsen
1-1:Karoly Potemkin
2-1:Andrew av Fløtum

**VB/Sumba-EB/Streymur 0-4 (0-0)**
0-1:Arnbjørn Hansen
0-2:Leif Niclasen
0-3:Leif Niclasen
0-4:Hans Pauli Samuelsen

# Pál setti NM-met

**Tá Mads Glæsner ikki var við á 800 metra teininum, skúgvaði Pál Joensen restina av feltinum til viks og kom á mál í eini tíð, sum var betri enn tað, sum nakar annar norðurlendingur hevur svomið**

SVIMJING

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað kann væl vera, at metini, sum føroyskir svimjarar seta í Danmarki ikki longur verða skrásett sum donsk met. Men tað man Pál Joensen ikki leggja tað heilt stóra í, tá tíðin kortini verður skrásett sum norðurlendskt met.

Tað var nevnliga tða, sum hendi, tá Pál Joensen um páskirnar svam teir 800 metrarnar í 7.54,40, sum er nærum tvey sekund betri enn tað, sum Mads Glæsner svam teinin upp á í Ballerup í februar mánaði.

Stóri spurningurin hjá Páli undan kappingini var, um hann hesa ferð kundi basa sterka dananum, men tað gekk ikki, hóast Pál eisini á 1.500 metrum svam undir gamla norðurlendska metið.

Verða úrsliutini hjá nú donsku Elspu Mørkøre tald við, so gjørdist føroyska úrtøkan í DM eitt gull-, fimm silvur- og tvey bronsumerki. Umframt gullmerkið á 800 metrum vann Pál Joensen tvey silvur- og eitt bronsumerki, meðan Elspa Mørkøre svam seg til trý silvurmerki og eina bronsu.

Hartil setti Páll Joensen sjey ferðir føroyskt met og altso eitt norðurlendskt. Shaila millum garðarnar setti tvey føroysk met og svam seg í eina finalu, og hjá Monu Simonsen var úrtøkan eisini tvey nýggj met og eitt finalupláss.

*Tá tíðirnar ikki kunnu góðskrivast sum danskt met, er bara eitt at gera. At svimja somikið skjótt, at talan verður um norðurlendskt met*

